gult cyan magenta svart



# Ein reinsaður Signar kennir seg svíktan av sínum egnu

*– Eg gangi út frá, at ein meiriluti í Tjóðveldisflokkinum hevur ringan smakk í munninum, sigur Signar á Brúnni, nú tað er greitt, at hann fær fult viðhald í síni embætismannaførslu í sjónvarpsmálinum - men kortini missir landsstýrissessin*

Niclas Johannesen



Signar sigraði. Men líkist kortini einum tapara í politiskum talvi.

Sjálvur dylir fyrrverandi, og nú reinsaði, landsstýrismaðurin ikki fyri, at hann er fegin. Og vónbrotin.

Fegin um, at tað loksins og endaligt bleiv staðfest týsdagin í 83 síðurs frágreiðing hjá kanningarstjóranum Petur Even Djurhuus, at Signar á Brúnni gjørdi onki galið, tá hann sum landsstýrismaður í snarari vending í fjørsummar skrivaði illa sperda SvF ein tjekk upp á 1,6 milliónir krónur.

Vónbrotin um, at lyftið um at sleppa aftur í Tinganes – um ein kanning reinsaði hann – ikki verður hildið.

### Herskin biti

Signar vísir til niðurstøðuna hjá Tjóðveldisflokkinum og beinleiðis endurgevingar í eitt nú Sosialinum frá formanni floksins Høgna Hoydal um, at varð Signar reinsaður, so bíðaði sami landsstýrissessur eftir tí politiskt roynda fuglfirðinginum.

Men nú tykist vera greitt, at nývaldi landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum Tórbjørn Jacobsen verður sitandi.

Ein herskin bitið at svølgja hjá Signari, sum ikki hevur gloymt, at tað var Tórbjørn, sum í mars í ár alment kravdi, at Signar mátti fara frá. Víst varð til frágreiðingina hjá løgtingsgrannskoðarunum, sum funnust at embætismannaførsluni hjá fyrrverandi landsstýrismanninum í sjónvarpsmálinum. Tórbjørn segði í viðtal við Dimmalætting 28. mars, at var niðurstøðan hjá grannskoðarunum røtt, so hevði maðurin við ábyrgdini brotið skottið millum tað útinnandi og tað lóggevandi valdið. Og tí mátti Signar frá.

– Tórbjørn var tann fyrsti at fella dóm í hesum máli, sigur Signar, ið kortini ikki vil siga stórvegis um tað, sum í síðsta enda eisini kann gerast eitt stríð um tjóðveldisatkvøður í Eysturoynni. Men hann leggur kortini aftrat.

– Eg haldi meg tó kunna siga við vissu, at var hann í mínari støðu og eg í hansara, so hevði eg aldrin funnið upp á at gjørt tað sama sum hann. Ja, eg føldi tað at vera óloyalt. Hann kundi um ikki annað ringt og spurt meg um málið.

### Blást upp

Sjálvur ivast Signar á Brúnni onga løtu í, at mest oyðileggjandi fyri hann hevur verið trongdin hjá tí, hann kallar »pørtum av pressuni og ávísum politikarum« at gera málið politiskt, uttan at seta seg inn í øll fakta.

– Eg haldi, hetta málið bleiv frá byrjan blást upp til nakað, tað ikki var. Og lýsingin av málinum var serstakliga eintáttað. Okkara grundgevingar høvdu ongan áhuga, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin, sum enn einaferð leggur dent á, at málið var serstakliga væl viðgjørt og kannað av umsitingini í undirvísingar- og mentamálastýrinum, áðrenn gjørt varð av at flyta SvF pengar fyri lønir og rokningar til Gramex og Koda, sum skuldu rindast. Annars kundi svartur skíggi og í evsta enda húsagangur raka almenna sjónvarpið.

– Okkara grundgevingar stóðu eisini at lesa í endurskoðaðu frágreiðingini frá løgtingsgrannskoðarunum. Men kortini vóru hesar grundgevingar ongantíð tiknar upp á tungu í almenna orðaskiftinum. Tær sluppu slettis ikki við í hetta kjakið, sigur Signar á Brúnni og hann leggur aftrat:

– Trupulleikin er – og tað vita allir politikarar – at andsøgn ofta er millum ymsar lógir. Stýrini sita hvør í sínum lagi og gera lógir, sum løgtingið samtykkir, og brádliga situr tú sum landsstýrismaður við ábyrgd av einum málsøki, har lógirnar ikki eru í tráð við hvørja aðra. Ein grein sigur eitt, meðan ein onnur sigur okkurt annað.

– Júst hesi støðu sat eg í. Hvat er so at gera?, spyr Signar og vísir á, at sjónvarpsmálið varð eisini sent út til økonomar hjá fíggjarmálastýrinum til viðgerðar, áðrenn tað loksins bleiv avgjørt at rinda 1,6 millión krónur til SvF.

### Ynskti sjálvur kanning

Signar á Brúnni leggur dent á, at hann sjálvur mest av øllum ynskti at fáa eina kanning av málinum. Hann var fullvísur í, at ein kanning fór at reinsa hann.

Tað var eisini Signar, ið sjálvur bað løgmann Anfinn Kallsberg loysa seg úr starvinum í vár. Men hann váttar, at hetta var ikki bara hansara egna hugskot.

– Ja, eg kanska føldi tað sum eitt trýst at gera tað, viðgongur Signar á Brúnni.

Trýstið varð eisini innanborðs í Tjóðveldisflokkinum, har tað sum síðani alment hevur fingið heitið »minst møguligi meirilutin« fekk Signar at biðja løgmann loysa seg úr starvi.

– Eg má eisini viðganga, at eg haldi mannagongdin síðani hevur verið løgin. Eg dugi ikki rættiliga at skilja, hví tað mitt í tí annars traditionelt friðarligu summarfrítíðini gjørdist so átroðkandi at seta nýggjan landsstýrismann. Serliga tá hugsað verður um, at frágreiðingin var so væl ávegis. Spyrt tú meg, so haldið eg, at tað hevði neyvan verið tann stóri skaðin, um bíðað varð eini 14 dagar aftrat, sigur Signar á Brúnni.

### Verður verandi

Hóast Signar ikki kennir seg væl viðfarnan í hesum máli, so hevur hann ongar ætlanir um at stinga í sekkin.

– Eg haldi, at málið um føroyskt fullveldið er meira týðandi enn so, og eg ætli mær at vera við til at gjøgnumføra hesa stóru ætlan. So eg eri ikki á veg úr Tjóðveldisflokkinum, sigur royndi løgtingsmaðurin, sum var valdur á ting fyrstu ferðina í 1970 og sum hevur røkt landsstýrissess undir trimum ymsum landsstýrum.

Hinvegin, so er síðsta orðið neyvan sagt í hesum máli. Signar vil nevniliga hava fund í Tjóðveldisflokkinum.

– Tað besta er, at eg eri reinsaður. Serliga stórt hevur trýstið verið á familjuna, sum í longri tíð hevur mugu liva við, at eg dagliga havi verið kriminaliseraður í fjølmiðlunum.



*Bjørn á Heygum:*

# Grundgevingin heldur ikki

*- Skuldi Signar veri› fríkendur, átti ta› at veri› tí hann handla›i í gó›ari trúgv og í ney›stø›u, og ikki vi› skítb‡ttu grundgevingini hjá kanningarstjóranum*

Jákup Mørk

Somiki› kontantur er Bjørn á Heygum, tá vit í gjár hittu hann á máli, og spurdur hann um júst lidnu frágrei›ingina, sum fríkennir Signar á Brúnni.

### Andsøgnin

Hin 25. mars stó› at lesa í Sosialinum, at Bjørn á Heygum var ikki í iva um, at Signar á Brúnni átti at fari frá sum landsst‡risma›ur í stundini. Orsøkina seg›i Bjørn á Heygum tá vera, at hann púra greitt hev›i broti› st‡risskipanarlógina.

Tá vit í gjár spurdu hann, um hann framvegis stó› fast vi› hesi or›, var hann púra avgjørdur, og seg›i at ta› gjørdi hann so sanniliga.

Orsøkin til framhaldandi fastu stø›utakanina hjá Bjørn er petti »Eru goldnu útrei›slurnar heimila›ar« sum stendur at lesa á sí›u 82 í frágrei›ingini frá kanningarstjóranum.

»Hvat vi›víkur støddini á útrei›sluni, so er talan um útrei›slur fyri íalt kr. 1.652.739,67. Virksemi› hjá SvF er á fíggjarlógini játta› undir játtanarslagnum »landsfyritøka«, i› merkir, at ikki er ásett neyvt hvør upphædd er játta› til hetta virksemi›, tá SvF bert í rakstri sínum skal uppfylla ta nettojáttan (inntøkur minus útrei›slur fyri vi›komandi játtanarár) ásett er í fíggjarlógini. Nettojáttanin fyri virksemi› hjá Svf fyri 1999 er í fíggjarlógini fyri hetta ár ásett til kr. 0, i› merkir, at raksturin fyri SvF ikki má geva hall fyri ári› 1999. Kanningarstjórin vísir í hesum sambandi á, at tá talan er um vanligar lønarútrei›slur til starvsfólk hjá SvF fyri juli 1999 og vanlig rindan fyri sjónvarpsrættindi og UMMS samstundis hevur havt sær fyri eyga›, at nettojáttanarkarmurin hjá SvF fyri 1999 skal halda og hevur grundarlag fyri at meta um hetta er gjørligt, so metir kanningarstjórin at goldna upphæddin í stødd liggur innanfyri játtanarupphæddini á fíggjarløgtingslógini.«


sosialurin
...jadagur 23. mars 2000
74. árgangur
www.sosialurin.fo
Signar frá í stundini
Sambært Bjørn á Heygum vísir kanningin hjá løg...sgrannskoðarunum, at Signar á Brúnni breyt ...andsins lógir, tá hann uttan loyvi játtaði ...pening til Sjónvarp Føroya. Fyri at ...yggja álitið á rættartrygdina ...sigur hann at fara frá í stundini, heldur sakførarin
Síða 3

*Sosialurin, 23. mars í ár. Bo›ini frá Bjørn á Heygum kunnu neyvan misskiljast*

– Har stendur, at sambært kanningarstjóranum er eitt 0 ikki longur eitt 0, sigur Bjørn á Heygum. Hann vísir á, at fyrst í pettinum stendur, at SvF skal uppfylla treytirnar um, at inntøkur minus útrei›slur skulu geva 0 samanlagt.

– Seinni stendur at lesa, at goldna upphæddin liggur innanfyri játtanarupphæddina á fíggjarløgtingslógini. Hetta hongur als ikki saman, sigur fyrrverandi løgtingsma›urin, sum eisini hevur veri› vi› til at smí›a› st‡risskipanarlógina.



### B‡ttisligt

Ví›ari sigur Bjørn á Heygum, at hann hev›i rokna› vi›, at um so var, at kanningarstjórin frammanundan hev›i gjørt av, at Signar á Brúnni skuldi fríkennast, so hev›i hann helst víst á, at landsst‡risma›urin handla›i í gó›ari trúgv og í eini ney›stø›u: – Eg hev›i í øllum førum ikki rokna› vi›, at hann fór at koma nøkrum so skítb‡ttum.

*Nú kanningarstjórin er li›ugur vi› arbei›i›, er Bjørn á Heygum ikki minni avgjørdur*

– Hatta er jú grundleggjandi í strí› vi› tey argument, sum Signar sjálvur førdi fram, tá máli› í sínari tí› var› reist. Frágrei›ingin sigur ikki eitt or› um, at talan var um ney›stø›u, men sta›festir bert, at ta› var í lagi at ávísa upphæddina, sigur Bjørn. Í sama vi›fangi leggur hann dent á, at um upphæddin var heimila› ella ikki, var als ikki nakar spurningur undan kanningini:

– Øll vóru samd um, at har vóru eingir pengar at játta. Eisini Signar á Brúnni, tí annars hev›i hann onga orsøk til at spyrja seg fyri hjá fíggjarmálast‡rinum ella fíggjarnevndini.

– Orsøkin til, at hann spurdi seg fyri, var jú grein 43, petti 2 í st‡risskipanarlógini, har ta› greitt stendur, at peningur ikki kann ávísast, uttan at játtan fyriliggur. Ta› n‡tist tær als ikki at vera løgfrø›ingur fyri at skilja, leggur Bjørn áherslu á. – Hatta er akkurát sum í Pipar og Salt, har tey siga seg hava rætt, sjálvt um onnur hava argumentini, sigur núverandi advokaturin heldur speiskur.

### Avlei›ingarnar

Um avlei›ingarnar av kanningini grei›ir Bjørn á Heygum frá, at eftir hansara tykki er ni›urstø›an bæ›i skammilig og syrgilig.

– Skal hetta skapa fordømi, so n‡tist einum landsst‡rismanni ikki longur at taka atlit til, hvørja játtan hann hevur at arbei›a undir. Líkamiki› um játtanin er 200.000, 500.000 ella 31 mió.kr., so ger ta› einki, um ein landsst‡risma›ur ávísur 43 mió.kr.

– Avlei›ingin av hesum er, at løgtingi› fyri eftirtí›ina er sett fullkomuliga út av spælinum, bæ›i sum játtanar- og eftirlitsmyndugleiki, og at úttinnandi valdi hevur frítt spæl, sigur Bjørn á Heygum at enda.

